# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Óheppin uttanríkisráðharri

Uttanríkisráðharrin hevur í Dimmalætting gjørt sínar viðmerkingar til forsetavalið í USA. Uttanríkisráðharrin er lítið heppin her. Hann heldur eitt nú, at tætta samstarvið millum Bush og Fogh hevur givið føroyingum nógv fleiri møguleikar í USA. Republikanararnir, sigur uttanríkisráðharrin, hava leitt USA út í heimin í eitt nú Irak og Afghanistan, og tá hava teir samstarvað við Danmark. Hann heldur einki vera at ivast í, at hetta hevur latið dyr upp fyri føroyingar í USA, sum vit hava notið gott av. Ta útsøgnina venda vit aftur til í morgin.

Uttanríkisráðharrin sigur McCain vera betra valið fyri okkum. Hann byggir sína áskoðan á eitt páhald um, at McCain, er meiri uttanríkissinnaður, og hann vil lata heimin meiri upp. Obama í sínum lagi fer at byggja múrar rundan um USA og er tí skaðiligur fyri Føroyar. Tað er torført at skilja, hvussu okkara uttanríkisráðharri kann hava fingið hesa fatan av báðum forsetavalevnum, tí bæði valevni hava verið rættiliga tigandi um uttanríkispolitikkin. Tó hevur Obama lovað at enda kríggið í Irak og herða kríggið í Afghanistan, meðan McCain lovar at herða bæði kríggj. Tað er als einki í valstríði Obamas, sum bendir á ein isolationistiskan uttanríkispolitikk og tí hevur Jørgen tikið sítt páhald úr leysum lofti.

Hvat kann so stutt sigast um bæði valevni? McCain hevur verið sum vindurin blæsir, stundum stuðlað búskapar- og fíggjarpolitikkin hjá Bush og stundum tikið frástøðu, hann hevur eins og Bush støðugt lovað skattalættar til háinntøkubólkarnar í tí trúgv, at hetta fór bøta búskapin. Hann hevur skift kós í etiskum spurningum, og eygleiðarar hava torført við at síggja munin á honum og Bush. Eisini í fíggjarkreppuni hevur hann sent út løgin signal í og við, at hann segði amerikanska búskapar- og fíggjarskipanina vera grundlegjandi sunna og góða. Hetta alt meðan fólk í túsundatali mistu arbeiði, hús og heim, og hallið á samveldisfíggjarlógini er søguliga stórt, mannarættindi traðkað undir fót og USA uttanríkispolitiskt isolerað.

Tað ber til at meta Obama sum eitt slag av europeiskum sosialdemokrati, tí hann hevur vanliga vælferð á skránni. Hartil vil hann lække skattin hjá lág- og meðalinntøkunum og enda kríggið í Irak. Men hetta er ikki tað, sum veruliga er áhugavert við Obama. Tað áhugaverda er, at hann merkir broyting og nýggja byrjan. USA skríggjar eftir broyting. Obama er øðrvísi og hann hevur eina heilt nýggja politiska dagsskrá, nakað, sum amerikanar ikki hava upplivað, síðan Clinton stillaði upp á fyrsta sinni. Obama vil endurnýggja orkupolitikk, búskapar- og fíggjarskipan, almannaskipan og útbúgvingarskipan. Hann stendur fyri einum mansóma, eini virðing og eini vælferð, sum í Europa er sjálvsøgd, sjálvt fyri fólkafloksmenn, men sum í USA er óvanlig. Tað er veruliga munur á Obama og McCain, og meirilutanum av fólkinum leingist burtur úr tí politiska, búskparliga og moralska kyksendi, sum stórkapitalurin og valdsklikan rundan um Bush og Cheney hava rikið landið útí.

**Sosialurin**

## Tað skal bera til hjá ungum familium at seta búgv í Havn



ALBERT ISFELD
arkitektur
Listi E

**Farið verður undir at taka stig til at útvega býlig grundstykkir í Tórshavnar kommunu**

**Íbúðarbygging**
Bústaður er mannarættur! Tórshavnar kommuna skal verða opin og taka væl ímoti øllum teim ungu, sum velja at búseta seg her. Vit fara at arbeiða fyri at útvega bílig leigugrundstykkir til ungar familjur og ungfólk, sum seta búgv í kommununi. Vit kenna slíka skipan frá Reykjavík.

Til tess at røkka hesum málsetningi keypir kommunan stór øki at leggja út til grundstykkir og íbúðarbygging. Vit skulu gera bæði lutaíbúðir og leiguíbúðir og eigaraíbúðir til ung sum gomul.

Vit fara at arbeiða við alternativum, eksperimenterandi íbúðarbygging, møguliga við studningi frá kommunu og landi, at vísa á nýggjar leiðir – ikki minst viðvíkjandi orkusparing, lítlum viðlíkahaldi og tættari bygging til tess at spara leiðingar og vegir, alt við einum økologiskum hugburði sum grundarlagi.

**Tað skal bera til hjá ungum familium at seta búgv í Havn**
Til tess at náa hesum máli verður arbeitt við at fólk gera íbúðir við høgari góðsku og byrjast kann við minni íbúð/húsið, sum seinni kann útbyggjast eftir tørvi.

Íbúðarøkini eiga at verða væl skipað og í tilknýti til tað býarbygging, sum annars fer fram nú, soleiðis at hesi ikki gerast “sovibýir”, men verða aktivir býlingar í einum annars pulseraðum býarlívið. Arbeiðspláss, handlar og tænastuvirksemi eigur eisini at kunna verða partar av nýggju býlingunum.

$CO_2$ útláti skal verða minst møguligt og hugsast má í sambandi við bústaðabygging um alternativa orku so sum vind, jørð, aldu, sól/ljósorku v.m.

Ferðslan til og frá býlingunum skal verða á tryggan hátt fyri øll, soleiðis skal verða gongubreytir/teigar og sýklubreytir á tryggan hátt.

**Í komadi vælskeiði skulu allar góðar kreftir arbeiða fyri, at ungar familiur kunnu seta búgv í Havn.**

## Býráðsvalið í Vági



FRÍÐGERÐ MIDJORD
sjúkrarøktarfrøðingur
Valevni á Uttanflokkalistanum

Undirritaða hevur latið seg stilla upp til býráðsvalið á Uttanflokkalistanum og fari eg at nema við okkurt, sum hevur við oyggj okkara at gera.

Tað sum í løtuni er frammi í tíðini, er m.a. at leggja Suðuroynna saman í eina kommunu, og er nakað at ivast í um so skuldi verið, tað er væl framtíðin hjá okkum øllum tað geldir.

Tosið um at vágbingar skulu undir tufluna hjá tvøramonnum, kann einki hava við sakina at gera, tí hvør sigur, at ein tvøramaður verður borgarstjóri í felags kommunini. Duga hinar kommunurnar at samarbeiða, so kann líka so væl onkur í hinum kommununum gerast borgarstjóri.

Er skili ringt sum er, verður tað enn nú verri, um vit ikki leggja saman, tað verður neyðugt. Her verður eingin trivnaður, um ikki verður lagt saman, tí, tá ið skúlamál, eldraøki og nógv nógv annað verður lagt út til kommununar at umsita, tá verður neyðugt at hava eina ávísa støðd á einari kommunu fyri at klára avbjóðingarnar.

Samanlegging hevur víst, at gott stendur burturúr, at leggja saman,tak eitt nú svimjingina í Suðuroy. Um vit løgdu oynna saman í fótbólti, so kanska eisini nakað positivt og gott hevði spurt burturúr tí. Teir ungu duga betur enn vit eldru í so máta.

Á eldraøkinum skulu vit sjálvandi eisini arb. saman, sjálvt um tvey ellisheim koma at vera. Tí fari eg, at stemma fyri einari kommunu um eg verði vald í býráðið. Nakað annað er, viðvíkjandi tí peningaligu støðuni av útgrevstrinum, tí enn eru eingir formar settir upp og eingir formar fyltir, so tilboðið fyri útgrevsturin man verða farin nógvar ferðir forbí, tað sum tilboðið frá fyrstantíð ljóðaði uppá. Spennandi og hugnaligt, tá ið ellisheimið og tað sosiala verður liðugt. Tá hava vit eitt fjølbroytt arbeiðspláss í Vági við nógvum eindum og nógvum starvsfólki til allar fakbólkarnar.

So vón mín verður, at hetta mikla tiltak kann blíva liðugt til frama fyri oyggj okkara og tað fólk, ið her býr.

Til seinast fari eg, at heita á tykkum veljarar um at velja Uttanflokkalistan lista A.

**Innsent tilfar**
Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo
Bergur Johannesen bergur@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.